# Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

**Eind 1:** **Heilsufrøðilig viðurskifti** **18. og 19. september 2001**
**Eind 2:** **HACCP** **1. og 2. oktober 2001**
**Eind 3:** **Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum** **16. og 17. oktober 2001**

**Málbólkur:** Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

**Undirvísarar:** Serfrøðingar í innaneftirliti

**Stað:** Hotel Føroyar í Havn, byrja verður allar dagar kl. 9.00
**dag 1 í hvørjari eind verður hildið á til kl. 21.00**
**dag 2 í hvørjari eind verður hildið á til kl. 17.00**

**Skeiðskostnaður:** Kr. 3.500 (4.000 við gisting) fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum).

**Próvtøka:** Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið.

**Frálæran fevnir m.a. um:**
Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvi, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Freistin at boða frá luttøku er **10. september 2001**. Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 316019. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 317500 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96 · 350 Vestmanna
Tlf. 424573 · Fax 424428
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

**Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti**

**Eind 1:** ___ **Set kross** **Eind 2:** ___ **Set kross** **Eind 3:** ___ **Set kross**

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |

www.sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3227

Navn: Sp/f 29/8-2001
Adressa: 410 Kollafjørður

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 29.08.2001
Viðtøkudato: 29.08.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Torgerð Dam, 410 Kollafjørður og Jóan Jacob Andreasen, 410 Kollafjørður.
Stjórn: Jóan Jacob Andreasen, 410 Kollafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóra felagsins.
Grannskoðari: : Sp/f AB-Grannskoðan, Sleipnisgøta 12, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.08.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka umsiting og útleigan av fastari ogn, handil og tað, sum stendur í samband við hetta.

Skráseting Føroya tann 31. august 2001

Kristin Balle


**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650



**SKALT TÚ MÁLA?**

Lat okkum mála fyri teg!



**Eyðun Jacobsen**
Málarameistari
Glyvrar
Tlf. 448355
Fartlf. 226504

Sosialurin 311820


**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

## Sjúkrasystrar

Tvey størv sum avloysarar við fullari arbeiðstíð í tíðini 1. oktober 2001 til 1. oktober 2002 eru leys at søkja.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

**innan 21. september 2001.**

## Maður søkist

Vegna sjúku verður søkt eftir manni at byrja beinavegin. Møguleiki er fyri varandi arbeiði.

**Atlanticpane**
P/F Kollafjørður
Tlf. 421405
Fax. 421602


**Brúktar byrsur**



**Nógvar góðar brúktar byrsur á goymslu**

**P/f Jógvan Weihe**
**Heil & smásøla**
**Staravegur 15**
**Box 1008 Tórshavn**
**Tlf. 313897**


## Starvsfólk sóknast til Injector í Vági

Vit sóknast starvsfólk til okkara CNC (teldustýrdu) skerimaskinur, at byrja sum skjótast.
Talan er um fast starv aftaná eina upplæring.
Teldukunnleiki er ein fyrimunur.

Umsóknir kunnu sendast til:
**Injector International Sp/f**
**Box 78**
**900 Vágur**

Ella ring á **tlf. 218111, 212611 ella 374111**


**Kliniskur sálarfrøðingur**
**Viðgerð og ráðgeving**

Samtaluviðgerð(terapi)
Ráðgeving av starvsbólkum
Kanningar · Skeið

**Ásvør Skaalum**
Kliniskur sálarfrøðingur
(Cand. Psych. Aut.)

J. Dahlsgøta 10, 100 Tórshavn, tel: 22 74 52
t-post: as@kallnet.fo




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2688, P/F Føroya Kolvetni, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 30.06.2001.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Terje Hagevang, Nordenveien 28, N-0755 Oslo.
Innkomin í nevndina: Hal Goldstein, c/o MHR Fund Management LLC, 40 West 57th st, 33rd Floor, New York, NY 10019, USA.

Skráseting Føroya tann 3. september 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2359, P/F Kongshavnar Trolarafelag, 600 Saltangará.

Viðtøkur broyttar: 19.06.2001
Nýtt navn: Sp/f Kongshavnar Trolarafelag
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 13.07.2000 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 200.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn (formaður), Thormund Johannesen, Suðuroyarvegur 6, 100 Tórshavn og Jón Niclas Johannesen, 655 Nes, Eysturoy.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Jónsvein Knudsen, á Heygum, 600 Saltangará.
Innkomin sum stjóri: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.

Skráseting Føroya tann 3. september 2001

Kristin Balle


**FLOG-FRAKT**
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR



**SAFARI TRANSPORT**
www.safari.fo
Tel. 32 22 22

Sosialurin - 311820





## Bilur til sølu



Vælhildin Opel Corsa Swing, árg. mai 1998, til sølu. Motorur: 1,4 – 16 V. 90 HK. Hevur bert havt ein eigara, ikki roykjari. Hevur koyrt 26.000 km. Komið og roynið bilin og gevið eitt boð!

**Ring tlf. 311395 í arbeiðstíð ella tlf. 313186 eftir kl. 18.00**

## Skip til sølu

**»MAI«**
**Línibátur/garnabátur**
**Føroyskt flagg**



| | |
|---|---|
| Bygt: | 1947 Thurø, Danmark – eik/bók |
| Stødd: | 24.95 m x 6.62 m |
| Klassi: | Sjóvinnufyrisitingin |
| Last: | Frystilast |
| Høvuðsmotorur: | 500 Bhp Grenaa Diesel, nýggjur frá 1974 |

Vilt tú vita meira um skipið, so ring til:

**P/F THOR**
FO-420 Hósvík
Tlf. 422503


**Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**


# Tiltøk í sept. 2001

**Norðurlandahúsið í Føroyum, Norræna Húsið í Reykjavík, N.A.P.A. (Nordens Institut på Grønland) og N.I.P.Å. (Nordens Institut på Åland) hava hvør sítt umboð á Bok- og Biblioteksmessuni í Gøteborg, Svøríki. Føroyskur luttakari er: Tóroddur Poulsen, rithøvundur.**

**Málninga- og keramikkframsýningin hjá Lotte og Anders Glob er í húsinum til og við 06. september.**

**Tiltakið við frásagnum og kvøðing úr norðurlendskum sagnum og vísum. Tiltakið er fyri fólkaskúlan 1.-5. fl. og er úti á bygd og í Norðurlandahúsinum. Luttakarar: Hedvig Westerlund, upplestur og Petra Iversen, kvøðing.**

**Leygardagur 01.** **kl. 9.00**
Norðurlendsk Psykiatrisk Ráðstevna

**Sunnudagur 02.** **kl. 16.00**
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

**Mánadagur 03.** **kl. 19.30**
Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, sýnir norska filmin »Við Orku og Fragd« frá 2001
**Fríðrikskirkjan** **kl. 20.00**
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

**Týsdagur 04.** **kl. 21.00**
**Mentanarhúsið í Fuglafirði**
Konsert við Camerata Lysy, Schweiz

**Hósdagur 06.** **kl. 9.00**
BUK (Norðurlendska Barna- og Ungdómskommitein) heldur fund

**Leygardagur 08.** **kl. 14.00**
Fotoframsýningin hjá Gunnie Moberg, Orknoyggjar letur upp.
**Sporið og Embla (Ísland)** **kl. 19.30**
fólkatónleikur og danur.

**Sunnudagur 09.** **kl. 16.00**
Konsert. Musikkskúlastevna.
Fyriskipari: Føroya Musikkskúli.

**Týsdagur 11.** **kl. 19.30**
Bókmentakvøld í Norðurlandahúsinum.
**Trongisvágs Skúli** **kl. 19.30**
Konsert v/ Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins. Guðrún Jóhanna Ólafsdóttir, Ísland, mezzosopran, og Víkingur Heiðar Ólafsson, Ísland, klaver

**Mikudagur 12.** **kl. 19.30**
Konsert v/ Orfeus, tónlistarfelag Norðurlandahúsins. Guðrún Jóhanna Ólafsdóttir, Ísland, mezzosopran og Víkingur Heiðar Ólafsson, Íslands, klaver

**Hósdagur 13.** **kl. 21.00**
Vísutiltak **á Sandi**. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikari, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

**Leygardagur 15.** **kl. 21.00**
Vísutiltak **í Trongisvágs skúla**. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikar, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

**Sunnudagur 16.** **kl. 16.00**
Vísutiltak. Luttakarar úr Danmark: Frits Helmuth, sjónleikari, Carl Ulrik Munk-Andersen, piano og Karsten Vogel, saxofon

**Hósdagur 20.** **kl. 17.00**
Málninga- og grafikkframsýningin hjá Astri Luihn, letur upp í Gallarí »Oyggin« **á Tvøroyri**, og verður framsýningin til og við 21. oktober

**Sunnudagur 23.** **kl. 16.00**
Konsert við »13 blásarum úr Føroya Symfoniorkestri«

**Fríggjadagur 28.** **kl. 14.00**
Fiskaaling skipar fyri almennum fundi

**Leygardagur 29.** **kl. 14.00**
Álendska framsýningin »Við seglskútum um Kap Horn« letur upp
**Álendski sjónleikurin** **kl. 16.00**
»Opalerna í Anemooka« verður framførdur.

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650